Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 25.06.2020 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Jóhan Christiansen
Brandur Jacobsen
Árni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Tollakur Joensen
Hans Mourits Foldbo
Gudny Langgaard
Uni Rasmussen
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari: Erik Lervig


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 44/20 | 20/00223-1 | 20/00223 - Flowteljari til vinnuvirkir í kommununi | 3 |
| 45/20 | 19/00249-8 | 19/00249 - Umsókn um byggiloyvi til seyðahús og hjall - Matr. 145h í Leirvík | 5 |
| 46/20 | 20/00089-11 | 20/00089 - Umsókn um at loysa húsatoft matr. nr. 86z í NG úr friðing | 6 |
| 47/20 | 20/00190-2 | 20/00190 - Umsókn um loyvi til at keypa part av matr.nr. 18a LV | 7 |
| 48/20 | 20/00226-2 | 20/00226 - Umsókn um loyvi at byggja uppí á matr. nr. 16 í Syðrugøtu | 9 |
| 49/20 | 20/00206-2 | 20/00206 - Fyrispurningur um fríøkið á Geytagøtu til grundstykki | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 50/20 | 20/00236-1 | Mál 20/00236 Keyp av matr. nr. 139 SG - Pottaverkætlan | 11 |
| 51/20 | 20/00188-2 | 20/00188 - Eykajáttanir mei 2020 | 12 |
| 52/20 | 20/00224-1 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 20/00224 - Umbøn um eykajáttan til konto 320 – børn við serligum tørvi | 14 |
| 53/20 | 20/00240-3 | Mál 20/00240 Útbygging av Framvit. Málslýsing og tilmæli. | 16 |
| 54/20 | 20/00244-2 | 20/00244 Uppskot um at játta fígging til verkætlanina TROM | 17 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 44/20 20/00223 - Flowteljari til vinnuvirkir í kommununi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.06.2020 | 19/20 | 20/00223-1 |
| 2 Vinnunevndin | 15.06.2020 | 24/20 | 20/00223-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 22.06.2020 | 42/20 | 20/00223-1 |
| 4 Býráðið | 25.06.2020 | 44/20 | 20/00223-1 |

| Málslýsing: |
|---|
| Fyri at tálma um óneyðuga vatnnýtslu, er ynski at seta Flowteljara upp til vinnukundar, sum brúka meir enn 20 tons av vatn um samdøgri.<br>Hetta er eisini fyri at kunna registrera, og fylgja betri við nýtsluni í kommununi. Hetta verður eisini gjørt í øðrum kommunum. Har liggur kostnaðurin fyri vinnukundar frá 0,75 kr. til 3 kr. pr. Tons.<br><br>Í miðal brúka virkini í kommununi áleið 900 tons av vatn um samdøgri. |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| Kostnaður fyri at seta flowteljara upp er ca. 250.000 kr. Tað er fyri flowteljarar og uppsetan/umlegging av skipanini, sum stýrir vatninum.<br>Eingin játtan er til endamálið í fíggjarætlanini fyri 2020. |

| Tilmæli |
|---|
| Mælt verður til at seta flowteljara á virkir, ið brúka meir enn 20 tons av vatn um samdøgri.<br>Kostnaðurin kundi verði 1.50 kr. pr. tons. |

**Vinnunevndin 15. juni 2020**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til at seta flowteljara á virkir. Vinnunevndin mælir samstundis til at finna upphæddina á verandi ætlan, ella veita eina eykajáttan á 250.000 kr.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 16. juni 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini og finna samlaða kostnaðin fyri íløguna til komandi býráðsfund, sum verður 25.06.2020.
Mælt verður til at taka gjald fyri vatnnýtslu, sum er omanfyri 20 tons pr. samdøgur. Tað merkir at man ikki skal gjalda fyri tey fyrstu 20 tonsini.

**<u>Fíggjarnevnd 22. juni 2020</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndini, og at gjaldið verður 0,75 kr. pr. tons.

Peningurin verður tikin av verandi játtan til vatn (konto 6.30.41.510)

**<u>Býráðið 25. juni 2020</u>**
Málið tikið av skrá

*Tollakur Joensen var úti undir viðgeðini vegna ógegni*

## 45/20 19/00249 - Umsókn um byggiloyvi til seyðahús og hjall - Matr. 145h í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.06.2020 | 20/20 | 19/00249-8 |
| 2 Býráðið | 25.06.2020 | 45/20 | 19/00249-8 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánari av matr. nr. 145h í Leirvík hevur sent umsókn um loyvi at byggja seyðhús á matr. nr. 145h í Leirvík.<br><br>Øki liggur í Øki J, sum er landbúnaðarøki.<br><br>Tekningar, sum eru sendar til kommununa samsvara ikki við ásetingina í Øki J: Landbúnaðarøki. (Sí tekningar í málinum).<br>Kommunan fær regluliga fyrispurning um innrætting av nýmótans seyðhús. Umsitingin sær eisini at tað er tann vegin, tey flestu fara, tá tey byggja seyðhús og líknandi. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at ganga umsóknini á møti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 16. juni 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. juni 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 46/20 20/00089 - Umsókn um at loysa húsatoft matr. nr. 86z í NG úr friðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.06.2020 | 21/20 | 20/00089-11 |
| 2 Býráðið | 25.06.2020 | 46/20 | 20/00089-11 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við útstykkingina í Norðragøtu liggur ein "hústoft", ið er friða á matrikklinum.<br>Í hesum sambandi hevur Eysturkommuna verið í samband við Tjóðsavnið. Fólk frá Tjóðsavninum hevur verið á staðnum og kannað viðurskiftini. Niðurstøðan bleiv at Hústoftin er friða, men sambært løgtingslóg nr.19 frá 16.septembur 1948 um friðan av fornminnum og bygningum, hevur Eysturkommuna møguleika at søkja um at loysa húsagrundina úr friðing.<br>Eysturkommuna sendi fyrispurning til Tjóðsavnið um at loysa Hústoftina úr friðing, tað er viðgjørt á fundi í Fornminnisnevndini tann 23. januar 2020.<br>Víst verður til skjal "*Viðvíkjandi húsatoft á matrikul 86z í Norðragøtu*" í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin heldur at býráðið skal taka støðu til niðurstøðuna hjá Tjóðsavninum.<br>Um Hústoftin skal varðveitast, sum friðað. Missur man eitt grundøki í útstykkingini.<br>Tað kann viðvirka til tað mentanarliga í kommununi, um man velur at varðveita Hústoftina, sum friðað. Tó krevur tað at man heldur toftina "viðlíka". |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 16. juni 2020**

Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at loysa hústoftina úr friðing.

**Býráðið 25. juni 2020**

Málið tikið av skrá

## 47/20 20/00190 - Umsókn um loyvi til at keypa part av matr.nr. 18a LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.06.2020 | 22/20 | 20/00190-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.06.2020 | 46/20 | 20/00190-2 |
| 3 Býráðið | 25.06.2020 | 47/20 | 20/00190-2 |

| Málslýsing: |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um loyvi at keypa part av matr. nr. 18a í Leirvík.<br><br>Umsøkjarin hevur ætlan at víðka um grundøki og gera parkering. Víst verður til umsókn í málinum.<br><br>Kommunan hevur fyrr haft eina ætlan um at gera eitt alment parkeringsøki á økinum, játtan var til endamálið í 2018, men av tí at arbeiði bleiv ikki gjørt, fall játtanin burtur. Tí er einki hent síðani. |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| |

| Tilmæli |
|---|
| Umsitingin heldur at tørvur er á parkeringspláss í økinum. Tískil verður mælt til at halda fast í ætlanini at gera parkeringsøki á matrikul nr. 18a í Leirvík. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 16. juni 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.
Mælt verður eisini til at fáa teknisku umsiting at gera uppskot til hvussu resterandi partur av matr. nr. 18a kann skipast, sum parkeringsøki.

Árni Jacobsen var úti undir viðgerðini.

**Fíggjarnevnd 22. juni 2020**
Fíggjarnevndin mæli til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 25. juni 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Árni Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

## 48/20 20/00226 - Umsókn um loyvi at byggja uppí á matr. nr. 16 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.06.2020 | 23/20 | 20/00226-2 |
| 2 Býráðið | 25.06.2020 | 48/20 | 20/00226-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánari av matr. nr. 16 í Syðrugøtu hevur søkt um loyvi at byggja uppí húsini.<br><br>Hann sigur at hann hevur ætlan at byggja hjallin um til búrúm. (Sí tekningar).<br><br>Um umsóknin skal gangast á møti, krevst frávik, tí avstandurin frá parkeringsøkinum til búrúmið verður 1.8 m. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at ganga umsókn um frávik á matr. nr. 16 í Syðrugøtu á møti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 16. juni 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. juni 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 49/20 20/00206 - Fyrispurningur um fríøkið á Geytagøtu til grundstykki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.06.2020 | 24/20 | 20/00206-2 |
| 2 Býráðið | 25.06.2020 | 49/20 | 20/00206-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið fyrispurning/umsókn um grundøki á matr. nr. 72f í Norðragøtu. (Sí umsókn).<br><br>Økið liggur í dag, sum fríøki. Tí skal byggisamtyktin broytast um tað skal leggjast út, sum grundøki.<br><br>Vísandi til "**Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn"**:<br><br>*Sambært kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn, so skal søla av fastogn bjóðast út alment, tó við nøkrum undantøkum t.d. grundstykkir. Í hesum føri er ikki talan um øki, ið er útlagt, sum grundstykki, og hetta líkur heldur ikki nøkrum av hinum undantiknum í lógini, tískil er ikki heimild at ganga umsóknini á møti.* |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir frá at ganga umsókn á møti. Ístaðin kann kommunan vísa til útstykkingina, sum er í gongd í Norðragøtu. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 16. juni 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. juni 2020**
Einmælt samtyt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 50/20 Mál 20/00236 Keyp av matr. nr. 139 SG - Pottaverkætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 15.06.2020 | 25/20 | 20/00236-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.06.2020 | 43/20 | 20/00236-1 |
| 3 Býráðið | 25.06.2020 | 50/20 | 20/00236-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í sambandi við keyp av jørð til pottar, savna og umstøður til dypparar, fyriliggur uppskot um sølu/keyp av matr. nr. 2 í Syðrugøtu í málið nr. 13/00350.<br>Hetta málið steðgaði fyri nøkrum árum síðani, tí kommunan ætlaði at keypa matr. Nr. 139 í Syðrugøtu, men tá bar tað ikki til.<br>Orsøkin til at kommunan ynskti at keypa stykkið til hesa verkætlanina er, at bygningurin sum er á økinum liggur bæði á matr. nr. 2 og matr. nr. 139.<br><br>Eigarin av matr. Nr. 139 í Syðrugøtu er nú sinnaður at selja stykkið. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongin upphædd er sett av til endamálið í 2020 |

| **Tilmæli** |
|---|
| Er áhugi fyri at fáa gongd á verkætlanina aftur, verður mælt til at finna upphæddina í verandi íløguætlan. |

**Vinnunevndin 15. juni 2020**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum mælir til at keypa matr. Nr. 139 í Syðrugøtu, sbrt. fyriliggjandi uppskoti.

**Fíggjarnevnd 22. juni 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini. Peningurin verður tikin av konto 61412 (Løga Syðurgøtusandur)

**Býráðið 25. juni 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

## 51/20 20/00188 - Eykajáttanir mei 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 25.05.2020 | 40/20 | 20/00188-2 |
| 2 Býráðið | 04.06.2020 | 38/20 | 20/00188-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 22.06.2020 | 44/20 | 20/00188-2 |
| 4 Býráðið | 25.06.2020 | 51/20 | 20/00188-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit/frágreiðing um eykajáttanir. Íalt er talan um eykajáttanir á 5.620.000,00 kr., har av 4.420.000,00 kr. eru til íløgur og 1.200.000,00 kr. eru til rakstur og viðlíkahald. Flestu eykajáttanirnar eru til arbeiðir sum eru byrjaði í fjør, men sum eru ella verða gjørd liðug í ár.<br><br>**Ískoyti 18.06.20**<br>1.viðgerð var á býráðsfundinum tann 4/6-20, og tá verð eisini samtykt at veita eykajáttan á kr. 1.350.000,00 kr. til felags reinsiverk til nýggju útstykkingina í Norðragøtu, og 150.000,00 kr. til ferðavinnumenning, og hesar báðar eykajánnaninar eru tiknar við her, soleiðis at samlaðu eykajáttaninar verða 7.120,000,00 kr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Eykajáttaninar viðføra at RLÙ verður 5,6 mió. kr. verri í 2020 enn ætlað.<br><br>**Ískoyti 18.06.20**<br>Eykajáttaninar viðføra at RLÙ verður 7,1 mió. kr. verri í 2020 enn ætlað. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttan á íalt 5.620.000,00 kr.<br><br>**Ískoyti 18.06.20**<br>Mælt verður til at veita eykajáttan á íalt 7.120.000,00 kr. |

### Fíggjarnevnd 25. maj 2020

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á íalt 5.620.000,00 kr. samb. fyriliggjandi yvirliti

**Býráðið 04. juni 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini og harumframt at veita eykajáttan á 150.000,00 kr. til ferðavinnumenning

**Fíggjarnevnd 22. juni 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á 7.120.000,00 kr

**Býráðið 25. juni 2020**
Einmælt samtykt at veit eykajáttanir á kr. 7.120.000,00 kr.

## 52/20 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 20/00224 - Umbøn um eykajáttan til konto 320 – børn við serligum tørvi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 17.06.2020 | 4/20 | 20/00224-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.06.2020 | 45/20 | 20/00224-1 |
| 3 Býráðið | 25.06.2020 | 52/20 | 20/00224-1 |

**Málslýsing:**

Á fíggjarætlanini 2020 er kr. 800.000 avsettar á konto 320 – *Børn við serligum tørvi.*

Til tann tørv, vit hava á dagstovna – og frítíðarøkinum í mun til børn, sum hava serligan tørv, er tað trupult at halda okkum innanfyri verandi játtan. Fram til summarferiuna 2020 koma vit at hava brúkt ¾ av játtanini og er einki, sum týðir uppá, at "tørvurin" verður minni eftir summarferiuna.
Hetta ger sum sagt, at tað ikki er møguligt at halda okkum innanfyri verandi játtan, um vit skulu geva hesum børnum eitt nøktandi tilboð og er tí neyðugt við eini eykajáttan.

| | | |
|---|---|---|
| **Ætlan 2020** | kr. | 800.000,00 |
| Framroknað til ultimo juni 2020 | kr. | 576.000,00 |
| | kr. | 224.000,00 |
| ½ aug - ultimo des. 2020 | kr. | 544.951,61 |
| **Mett eykajáttan** | **kr.** | **320.951,61*** |

*Óvissan er um hetta talið kemur at halda, tí her er bert talan um børn við í dag við vissu hava "serligan tørv". Tí kann hugsast at hetta ikki kemur at halda!

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at eykajáttan verður gjørd á kr. 350.000

**Trivnaðarnevndin 17. juni 2020**
Trivnaðarnevndin mælir til at veita eykajáttan á kr. 350.000

**Fíggjarnevnd 22. juni 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

**Býráðið 25. juni 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

## 53/20 Mál 20/00240 Útbygging av Framvit. Málslýsing og tilmæli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 17.06.2020 | 52/20 | 20/00240-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.06.2020 | 48/20 | 20/00240-3 |
| 3 Býráðið | 25.06.2020 | 53/20 | 20/00240-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til tilmæli frá stýrinum fyri Framvit. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 17. juni 2020**

Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá stýrinum fyri Framvit, dagfest 11. juni 2020.
Mentanarnevndin mælir samstundis til, at Fíggjarnevndin setir seg í samband við Fíggjarnevndina í Fuglafjarðar kommunu viðv. fíggjarleistum til felags framtíðaríløgur.

Brandur Jacobsen mælir til, at málið verður ein partur av fíggjarætlanararbeiðnum í heyst.

**Fíggjarnevnd 22. juni 2020**

Fíggjarnevndin mælir til at fíggjarnevndinar í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu seta seg saman at tosað um felags fíggjarleist fyri framtíðar íløgur, áðrenn støða verður tikin til út- og umbygging av Framvit.

**Býráðið 25. juni 2020**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggarnevndini.

# 54/20 20/00244 Uppskot um at játta fígging til verkætlanina TROM

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 22.06.2020 | 49/20 | 20/00244-2 |
| 2 Býráðið | 25.06.2020 | 54/20 | 20/00244-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi skriv har skoti verður upp at:<br><br>*"Játtaðar verða 1 mió kr. til verkætlanina TROM*<br>*Eysturkommuna leggur sum treyt fyri játtanini, at TROM í størstan mun møguligt verður fyrireikað, tikin upp og framleidd í Føroyum og í hóskandi mun í økjum, umhvørvum og hølum í Eysturkommunu."* |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Eingin játtan er til endamálið og óvist nær stuðulin skal útgjaldast, mest sanlíkt skal ein partur gjaldast út seinni í ár og ein partur komandi ár. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Fíggjarnevnd 22. juni 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við uppskotinum, tó við tí treyt at partur av upptøkunum verða gjørdar í Føroyum, og í Eysturkommunu.

**Býráðið 25. juni 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, við tí treyt at landið eisini stuðlar verkætlanini við eini munandi upphædd

fundurin lokin kl. 19.00

Jóhan Christiansen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen

Hanna Jensen